# Álit

# í

**løgtingsmáli nr. 112/2023: Uppskot til løgtingslóg um at verja ófødda barnið**

Steffan Klein Poulsen og Jenis av Rana, løgtingsmenn, hava vegna Miðflokkin lagt málið fram tann 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð tann 20. mars 2024 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 3., 24., 29. og 30. apríl og 2. mai 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Mammuhjálpina, Føroya Pro Vita, Frítt Val, MEGD, Læknafelag Føroya, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar, Etiska ráðið, Ljósmøðrafelag Føroya, Javnstøðunevndina, Almannaverkið, Gigni, Hagstovuna, Sjúkrahúsverk Føroya, landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóna Nolsøe Joensen, landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, landsstýriskvinnuna í heilsumálum, Margit Stórá, landsstýriskvinnuna í Almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg, og landsstýrismannin í lógarmálum, Bjarna K. Petersen.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í tríggjar minnilutar.

**Ein minniluti** (Hervør Pálsdóttir, Kristianna Winther Poulsen og Kim Durhuus) viðmerkir, at hetta málið er viðgjørt saman við løgtingsmálinum 88/2023 Uppskot til løgtingslóg um fosturtøku (Fosturtøkulógin), og tí verður víst til álitið í tí málinum.

Við hesum viðmerkingum tekur hesin minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Ein annar minniluti** (Henrik Old) tekur ikki undir við málinum.

**Ein triði minniluti (**Helgi Abrahamsen, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið tryggjar øllum børnum í móðurlívi rættin til lívið. Ein rætt til lívið, sum gevur lut í tilveruni, vit føddu njóta í dag.

Heldur enn at kopiera tær loysnir, sum okkara grannalond hava valt, hava vit ein gyltan møguleika at gerast eitt fyridømi fyri grannarnar og heimsins lond við at tryggja teimum óføddu børnunum rættin til lívið og vísa teimum ta tign, tey hava uppiborið.

Sum eitt av heimsins ríkastu londum er tað væl møguligt at gera orðini í hesum uppskoti til veruleika. Við at stovna eina hjálpareind, sum ítøkiliga og við nærlagni skal hjálpa foreldrum bæði áðrenn og aftaná føðing, verða bæði mammur og pápar, sum koma í eina trupla støðu, hjálpt.

Fokus flytur seg skjótt til, hvørja hjálp ein einsamøll mamma ella foreldur fáa, eftir at barnið er føtt. Nevndin hevur fingið staðfest, at sosialu skipaninar í Føroyum eru góðar. § 2 í uppskotinum er tó púra greið um, at hjálp ikki bara skal veitast eftir føðing, men eisini í viðgongutíðini, soleiðis at mamman og pápin kunnu føla seg á tryggum grundarlagi frá fyrsta degi, tey eru vitandi um, at mamman er við barn.

Fosturtøka er hinvegin ein óneyðug og sera vánalig samfelagsloysn fyri Føroyar. Barnið, mamman og pápin hava uppiborið betur. Tey hava uppiborið alla hugsandi hjálp til at seta teirra barn í verðina.

Føroysk lóggáva ger í nógvum førum ikki mun á einum fostri og tí, sum er livandi føtt - menniskja ella djóri.

Sambært arvalógini hevur eitt barn arvarætt eftir pápa sín, sjálvt um pápin er deyður, áðrenn barnið er føtt. Um eitt barn er gitið í móðurlívi, beint áðrenn pápin doyr, er barnið, sum verður føtt níggju mánaðir seinni, kortini arvingi eftir pápan. Tað hevur fullan arvarætt, hóast onkur vil siga, at tað ikki var eitt barn, tá pápin doyði.

Sambært fuglaveiðulógini eru egg hjá friðaðum fugli eisini friðað, hóast tað sum er í egginum er eitt fostur og ikki ein fullvaksin fuglur.

Lívið verður í hesum lógunum roknað sum lív frá gitnaði og verður eisini vart frá gitnaði. Hetta er í samsvari við heimsyvirlýsingina hjá ST um mannarættindi, sum staðfestir, at okkara mannarættindi ikki eiga at vera okkum givin frá øðrum, men eru ómissandi tí vit eru menniskju, sí greinarnar 1, 3 og 6. Mest grundleggjandi mannarætturin hjá okkum øllum er rætturin til lívið. Ófødda barnið er í hesum sambandi eisini partur av familjuni menniskja, og má tí fatast at hava sama virðið og tign og krav uppá somu vernd og verju frá samfelagnum móti at vera týnt, sum øll onnur í hesari familju. Tí kunna vit ikki annað enn staðfesta, at tey óføddu børnini hava sama ómissandi rætt til lívið sum øll onnur, ið fødd eru.

Í 2018 fingu vit eina djóravælferðarlóg. Í serligu viðmerkingunum til tað lógaruppskotið stóð, at lógin eisini fevnir um ymisk menningarstig av nevndu djórunum, áðrenn tey eru fødd ella klakt, um sansagøgnini samsvara við tey hjá livandi djórum.

Tað tykist løgið, at eitt fostur hevur arvarætt eftir pápa sín, men samtíðis hevur pápin ikki rætt at verja barnið móti fosturtøku.

Tað hevur verið víst á, at hetta lógaruppskotið er eitt totalt bann av fosturtøku. Fyrst er at siga, at uppskotið tryggjar rættin til lívið.

Tá tað kemur til eina støðu, har lív stendur ímóti lívi, er spurningurin ikki, um ein fosturtøka skal fremjast ella ikki. Sjúkrahúsverkið er ætlað til at bjarga lívi og at loysa heilsutrupulleikar – bæði hjá mammuni og hjá barninum. Megnar sjúkrahúsverkið ikki at bjarga báðum, er hvørki talan um eina fosturtøku ella eitt fosturtøkubann, men um eina vanlukkuliga avleiðing av, at tað ikki eydnaðist at bjarga báðum. Lív ímóti lívi skal síggjast sum ein slík støða. Og skal valið takast, verður tað mamman, pápin ella næstu avvarðandi, sum eftir tilmæli frá læknum og serkønum velja ta loysn, sum tryggjar lív.

Eins og okkara sjúkrahúsverk er ætlað at bjarga lívi, kunnu løgtingsmenn og løgtingskvinnur við at samtykkja hetta uppskotið bjarga tíggjutals og við tíðini hundrað- og túsundatals føroyskum borgarum við at tryggja teimum rættin til lívið.

Við hesum viðmerkingum tekur hesin minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Rættarnevndin, 13. mai 2024**

| | | |
|---|---|---|
| Hervør Pálsdóttir<br>forkvinna | Helgi Abrahamsen<br>næstformaður | Kristianna W. Poulsen |
| Henrik Old | Kim Durhuus | Steffan Klein Poulsen |

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur